

*Ivar Hansen, fólkatingsformaður, andaðist gjáranáttina 64 ára gamal*

# Ivar Hansen deyður

**Ivar Hansen, fólkatingsformaður og fyrrverandi ráðharri er deyður**

Gjáramorgunin varð fráboðað, at Ivar Hansen, formaður í Fólkatinginum, var deyður 64 ára gamal.

Ivar Hansen gjørdist formaður í Fólkatinginum í 1998. Hann varð fyrstu ferð valdur í Fólkatingið fyri flokkin Vinstra í Ribe Amti 1973 og kom í formansskapin í 1990.

Eitt stutt skifti, í 1978-79 var Ivar Hansen ráðharri í almennum arbeiðum í SV-stjórnini hjá Anker Jørgensen.

Sum fólkatingsmaður hevði Ivar Hansen fleiri álitisstørv. Hann var formaður í tingbólkinum hjá Vinstra frá 1982 til 1998 og politiskur framsøgumaður frá 1987 til 1991. Hann var ríkisgrannskoðari frá 1982 til 1998 og formaður hjá ríkisgrannskoðarunum frá 1995 til 1998. Frá 1976 til 1978 var hann limur í Fólkatingsins fíggjarnevnd og aftur frá 1986 til 1988, tá hann var formaður í nevndini.

Frá 1986 til 1988 var hann formaður í fíggjarnevndini hjá norðurlendska ráðharraráðnum.

Sum fólkatingsformaður varð Ivar Hansen nógv avhildin millum tingmenn. Hann var nýskipanarhugaður sum formaður, men legði samstundis stóran dent á, at Fólkatingið skuldi varðveita sína tign.

Á ólavsøku í fjør vóru Ivar Hansen og konan í Føroyum sum gestir hjá Løgtinginum í sambandi við, at 150 ár vóru liðin, síðani Løgtingið varð endurreist.

# Farmaleiðir leggjast lamnar



*Farmaskip undir føroyskum flaggi verða nú rakt av arbeiðssteðgi. Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Reiðarafelag fyri Farmaskip vrakaðu týsnáttina semingsuppskotið frá semingsstovninum*

**Føroya Skipara- og navigatørfelag og Reiðarafelagið fyri Farmaskip, sum týsnáttina sótu í lønarsamráðingum vrakaðu semingsuppskotið, sum semingsstovnurin legði fram. Hetta hevur við sær, at feløgini bæði settu arbeiðssteðg í verk, galdandi frá middegi í gjár**

VERKFALL
*Ingrid Bjarnastein*

Týsnáttina sótu Føroya Skipara- og navigatørfelag og Reiðarafelagið fyri Farmaskip í sáttmálasamráðingum, men hvørgin vildi góðtaka uppskotið, sum semingsstovnurin legði fram.

Sáttmálin fór úr gildi 1. mars 2003, og í uppskotinum, sum lagt fram, skuldi hann leingjast til 1. mars 2004.

– Samráðst hevur verið um lønir við meira, sigur Ellindur Abrahamsen, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

– Millum annað var arbeiðsdagurin broyttur úr 10 tímum til 11 tímar men lønin var ikki broytt samsvarandi. Vit fáa bara ein brøkpart av tí tímanum, og so væl spælir klaverið heldur kki.

Semingsuppskotið varð, sum sagt, vrakað, og arbeiðssteðgurin varð lýstur á middegi í gjár.

Arbeiðssteðgurin rakar farmaskip undir føroyskum flaggi og ferðafólkaskipið Norrønu. Øll farmasigling verður tó ikki rakt. Skipið Clare hjá Smyril Line er ikki undir føroyskum flaggi, og Skipafelagið hevur 2 leigað útlendsk skip í regluligari sigling. Harafturat hevur Skipafelagið í løtuni leigað útlendska skipið Green Ice, tí Lómur er til umvælingar. Bátarnir hjá Eimskip eru heldur ikki undir føroyskum flaggi.

# Norröna liggur

**Verkfallið hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Reiðarafelaganum fyri Farmaskip hevur við sær, at Norröna sleppur ikki avstað hóskvøldið**

VERKFALL
*Solby A. Eliasen*

Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, sigur, at verkfallið hjá teimum báðum feløgunum hevur bert við sær, at Norröna ikki sleppur avstað hóskvøldið.

– Vit ætla, at Clare skal taka farmin ístaðin fyri, og hon fer so avstað hóskvøldið ístaðin fyri fríggjakvøld, sum vanligt. Tað veldst um, hvussu langt verkfallið verður, men fyri fyrst merkir tað altso bert, at Norröna verður liggjandi, sigur Óli Hammer í stuttari viðmerking, tá Sosialurin hevði hann í telefonini úr Skipasmiðjuni í Lübeck.

# Kall bjóðar fartelefonhald

**Kall fer nú eisini at bjóða føroyingum møguleikan at tekna hald av fartelefon. Higartil hevur talan bert verið um talutíð undir herrópinum Frælsi, men nú bjóðar Kall eisini Føroya Tele av við haldi**

FARTELEFONI

Kall bjóðar nú øllum føroyingum fartelefon-hald.

Talan er bert um eitt slag av haldi. Orsøkin er einføld tann, at tað kann vera ringt hjá kundum at skilja ímillum ymisk sløg av haldi. Haldið fæst fyri ymiskar prísir. Hevur kundin fastnet hjá Kalli, fær kundin 20% í avsláttri av vanliga prísinum. Henda tænastan verður nevnd Samkall. Kundar við Samkall fáa allar tænastur frá Kalli á einari rokning.

Harumframt fáa kundar, sum hava fleiri enn 1 hald, tey næstu høldini fyri 50% í avsláttri. Í haldinum er eisini enn ein slóðbrótandi tænasta nevnd "Ókeypis korterið". Tað eru 15 ókeypis minuttir at ringja til fastnet- og fartelefonir innanlands, sum felagin fær við í haldinum, hvønn mánað. Minutprísurin verður annars tann sami dag og nátt.

Haldið hevur eisini flest allar tænastur ókeypis. T.e. Vís nummar, Nummarloynd, SMS-boð, Boðklivi, Dátaflutningur, Víðaristilling, Boðtóni, sperr, parkering, fleirpartasamrøða og altjóða reiking.

Tað er ókeypis at stovna haldið. Kall hevur í hesum vikuni sent yvir 4000 brøv til kundar, har teir fáa boðið at stovna fartelefonhald. Harumframt fer tað at bera til at stovna haldið hjá Elding í SMS, Runavík og í Klaksvík og hjá J.S. Radio í Handilskjarnanum.

Kall ger næstu mánaðirnar altjóða avtalur við útlendskar televeitarar. Hesar avtalur hava við sær, at til ber at hava fartelefonina við tær uttanlands; tað sum kallað verður altjóða reiking.

Síðani 21. november í fjør hevur Kall bjóðað kundum fartelefoni. Fyrsta tænastan var Frælsi - talutíðarhald og higartil hava yvir 4.000 felagar roynt hesa tænastu.

